**Garantitreytir fyri Grant vindeygu og hurðar**

**Galdandi frá: 1. januar 2026**
**Grant P/F, v-tal 370.827**

Hesar garantitreytir eru galdandi fyri vindeygu og hurðar, sum verða seld av **Grant P/F** undir vørumerkjunum:

- **Grant H-Dygd**
- **Grant Primo**

Grant H-Dygd er vørurøð hjá Grant við vindeygum og hurðum í høgari góðsku.

Grant Primo eru vindeygu og hurðar, sum verða seld undir Grant Primo vørumerkinum og eru framleidd av Primo Vinduer A/S.

Garantiið er givið av Grant P/F og fevnir bert um tær vørur, sum eru seldar undir nevndu vørumerkjum.

Fyri vørur, tænastur, projekt, serframleiðslu, innkeyptar vørur ella aðra sølu, sum ikki er seld undir **Grant H-Dygd** ella **Grant Primo** vørumerkjunum, eru vanligar sølu-, veitingar- og garantitreytir hjá Grant galdandi, uttan so at annað er skrivliga avtalað.

Garantiið er ein sjálvstøðug og sjálvboðin handilslig ábyrgd frá Grant P/F. Garantiið kemur afturat – men ikki í staðin fyri – tey rættindi, sum keypari møguliga hevur sambært ófrávíkiligari lóggávu ella skrivligari avtalu við Grant, veitara ella arbeiðstakara. Um ein áseting í hesum garantitreytum stríðir móti ófrávíkiligari lóggávu, hevur slík lóggáva framíhjárætt.

---

**1. Vørumóttøka og kanning áðrenn montering**

Keypari, móttakari og/ella tann, sum skal montera vøruna, hevur skyldu til beinanvegin við móttøku og áðrenn montering at gera eina forsvarliga og neyva kanning av, um veitingin er røtt, fullfíggjað og í samsvari við ordra, ordraváttan og aðrar skrivliga avtalaðar specifikatiónir.

Áðrenn montering verður byrjað, skal kannast:

- at talið av elementum er rætt
- at mál, litur og specifikationir samsvara við ordra ella ordraváttan
- at vøran ikki hevur sjónligar skaðar ella manglar
- at emballagan ikki hevur tekin um fraktskaða
- at vøran annars samsvarar við avtalaðu veitingina

Um vøran ikki samsvarar við ordra, ordraváttan ella aðrar skrivliga avtalaðar specifikatiónir, ella um sjónligir feilir, skaðar ella manglar verða staðfestir ella við vanligari og forsvarligari kanning áttu at verið staðfestir, skal Grant fráboðast skrivliga uttan óneyðugan drál og í øllum førum áðrenn montering, tillaging ella onnur nýtsla verður byrjað.

Vørur, har sjónligur feilur, skaði, mangul ella skeiv levering er staðfest ella átti at verið staðfest við slíkari kanning, mugu ikki monterast, tillagast, broytast ella á annan hátt takast í nýtslu uttan frammanundan skrivliga góðkenning frá Grant.

Verður vøran kortini monterað, tillagað, broytt ella tikin í nýtslu, hóast sjónligur feilur, skaði, mangul ella skeiv levering var ella átti at verið staðfest við vanligari móttøkukanning, kann Grant vísa reklamation, garantiáheitan ella annað krav aftur heilt ella lutvíst. Hetta er serliga galdandi, um Grant ikki longur kann kanna vøruna á nøktandi hátt, um skaðin er vorðin størri, ella um rættarstøðan hjá Grant á annan hátt er skerd.

---

**2. Skaðar undir flutning (fragtskaðar)**

Keypari ella móttakari skal beinanvegin við móttøku kanna elementini og emballaguna fyri sjónligar fraktskaðar og tryggja, at møguligir fraktskaðar verða nøktandi skjalprógvaðir.

Um fraktskaði verður staðfestur, skal Grant fráboðast skrivliga uttan óneyðugan drál og í seinasta lagi **24 tímar eftir móttøku**. Fráboðanin skal vera so nágreinilig, at Grant kann meta um skaðan og taka støðu til víðari viðgerð.

Fráboðanin skal innihalda:

- ordra- ella fakturanummar
- myndir av skaðanum
- myndir av emballagu
- lýsing av skaðanum
- upplýsingar um móttøkutíðspunkt

Verður fraktskaði ikki fráboðaður innan omanfyri nevndu freist, og uttan at keypari kann prógva, at skaðin ikki rímiliga kundi verið staðfestur fyrr, kann Grant vísa kravinum aftur.

---

**3. Garantitíðir**

| **Vøra / partur** | **Fevnir um** | **Garantitíð** |
|---|---|---|
| Grant H-Dygd vindeygu og hurðar | Grant H-Dygd | 5 ár |
| Grant Primo vindeygu og hurðar | Grant Primo | 5 ár |
| Premislide dragihurðar | Grant H-Dygd | 5 ár |
| Fabriksmonterað beslag og vanligir mekaniskir lutir | Grant H-Dygd og Grant Primo | 5 ár |
| Málaðar/lakeraðar fyllingar í træ | Grant H-Dygd | 5 ár |
| Elektroniskar vørur og tilhoyr, t.d. el-lás, el-vindeygaopnarar, hurðalukkarar, hurðapumpur, handtøk, cylindarar o.l. | Grant H-Dygd og Grant Primo | 2 ár |
| Sjónlig góðska á rútaglasi | Grant H-Dygd og Grant Primo | 3 mánaðir frá nýtsludegi |

| Vøra / partur | Fevnir um | Garantitíð |
|---|---|---|
| Sjónlig góðska á rútaglasi í nýbygging | Grant H-Dygd og Grant Primo | 3 mánaðir frá innflytingardegi |

Garantitíðin verður, um ikki annað er skrivliga avtalað ella beinleiðis ásett í hesum garantitreytum, roknað frá tí degi, tá vøran verður latin frá Grant.

Tað er keyparans ábyrgd at skjalprógva leveringstíðspunktið. Um leveringstíðspunktið ikki verður skjalprógvað á nøktandi hátt, hevur Grant rætt til at leggja framleiðsludag, vørumerking, ordraupplýsingar, fakturadato ella annað sambæriligt skjalprógv til grund fyri áseting av garantitíðarskeiðinum.

Grant átekur sær ikki skyldu til at goyma, framleiða ella útvega eykalutir í nakað ávíst tíðarskeið. Um sami eykalutur ikki longur er tøkur, hevur Grant rætt til, eftir egnum vali, at veita annan hóskandi og virkisliga samsvarandi lút ella aðra rímiliga avhjálpingarloysn.

---

**4. Serliga stór element**

Grant kann framleiða stór vindeygu, hurðar, fastkarmar, rútapartar og onnur element. Garantiið er tó treytað av, at vøran verður nýtt, projekterað, handfarin, monterað og viðlíkahildin rætt í mun til støðd, vekt, staðseting og veðurviðurskifti.

Fyri **fastkarms-element**, har einki einstakt mál er størri enn **2500 mm**, fevnir garantiið um framleiðslu- og tilfarsfeilir sambært hesum garantitreytum.

Fyri **opningsvindeygu, hurðar og onnur element við røriligum pørtum**, har einki einstakt mál er størri enn **1288 mm**, fevnir garantiið um framleiðslu- og tilfarsfeilir sambært hesum garantitreytum.

Fyri **opningsvindeygu, hurðar og onnur element við røriligum pørtum** størri enn **1288 x 1288 mm**, ella har annað mátið er størri enn **1288 mm**, fevnir garantiið bert um prógvaðar framleiðslu- og tilfarsfeilir, sum kunnu førast beinleiðis aftur til Grant.

Fyri **fastkarms-element**, har annað mátið er størri enn **2500 mm**, fevnir garantiið bert um prógvaðar framleiðslu- og tilfarsfeilir, sum kunnu førast beinleiðis aftur til Grant.

Keypari skal vera varugur við, at stór og serliga stór element eru meira viðkvom fyri ávirkan frá vindi, veðurtrýsti, regni, sjóroki, hitabroytingum og rørslum í bygninginum. Hetta kann hava við sær, at element kunnu flyta seg, skjóta seg, fáa funktiónstrupulleikar ella gerast ótøtt, uttan at talan er um framleiðslu- ella tilfarsfeil.

Garantiið fevnir ikki um lekar, skeivleikar, rørslur, deformeringar, glasbrot, termiskt brot ella funktiónstrupulleikar á stórum ella serliga stórum elementum, tá hetta stavar frá veðurávirkan, vindi, veðurtrýsti, regni, sjóroki, hitabroytingum, bygningsrørslum, montering, klossing, festing, avstíving ella øðrum viðurskiftum uttan fyri sjálva framleiðsluna.

---

**5. Hvat fevnir garantiið um?**

Garantiið fevnir um framleiðslu- og tilfarsfeilir á Grant vindeygum og hurðum, sum verða staðfestir innan fyri galdandi garantitíðarskeið.

Ein framleiðslu- ella tilfarsfeilur er ein feilur, sum kann førast aftur til sjálva framleiðsluna ella tilfarið í vøruni, og sum ikki stavar frá viðurskiftum eftir levering.

Um ein feilur verður góðkendur sum garantifeilur, hevur Grant eftir egnum vali rætt – sum full og endalig uppfylling av garantiábyrgdini – at velja eina av hesum loysnunum:

- umvæling av vøruni
- lutvís útskifting
- levering av nýggjum luti
- levering av nýggjari tilsvarandi vøru

Um sama vøra ella sami lútur ikki longur er í framleiðslu, á goymslu ella annars tøkur, kann Grant veita aðra samsvarandi vøru ella loysn, ið í høvuðsheitum samsvarar við upprunaligu vøruna í funktión og virði.

Grant hevur eisini rætt til at velja, um avhjálpan skal fara fram við umvæling, lutvísari útskifting, levering av stakluti, levering av nýggjari vøru, príslækking ella aðrari rímiligari loysn, í tann mun galdandi ófrávíkilig lóg ikki ásetir annað.

---

**6. Útreiðslur, sum ikki eru fevndar**

Garantiið fevnir ikki um útreiðslur til:

- niðurtøku av gomlum elementi
- uppsetan av nýggjum elementi
- stillads, krana, lyftibúnað ella aðra atkomu
- innvendigt ella útvendigt fylgiarbeiði
- puss, klædning, listar, fugur, máling ella aðra liðugtgerð
- tap vegna seinking
- rakstrartap
- leigutap
- fylgiskaðar
- aðrar óbeinleiðis útreiðslur ella tap

Grant hevur sostatt bert ábyrgd av sjálvari vøruni ella tí partinum, sum er fevndur av einum góðkendum garantifeili. Í mesta lagi, sum loyvt er sambært galdandi lóggávu, ber Grant ikki ábyrgd fyri óbeinleiðis tapi, fylgiskaða, rakstrarsteðgi, vinnumiss, mistum inntøkum, leigutapi, tíðarspillu ella øðrum avleiddum fíggjarligum missi.

---

**7. Treytir fyri at garantiið er galdandi**

Garantiið er treytað av, at:

- køran er monterað rætt og fakliga forsvarligt
- vøran er monterað sambært galdandi monteringsvegleiðing frá Grant
- vøran er viðlíkahildin sambært galdandi viðlíkahaldsvegleiðing frá Grant
- vøran er goymd, flutt og handfarin rætt áðrenn montering
- vøran er vard móti veðri, vætu, skitti og byggiskaðum áðrenn og undir montering
- vøran ikki hevur fingið skaða eftir levering
- neyðugt og leypandi viðlíkahald er framt
- reklamation verður fráboðað rættstundis

Manglandi ella skeiv montering, skeiv goymsla, skeiv handfaring, nýtsla í stríð við vegleiðingar, manglandi verjing á byggiplássi ella manglandi viðlíkahald kann hava við sær, at garantiið fellur burtur heilt ella lutvíst, um og í tann mun orsakasamband er millum hesi viðurskifti og tann fráboðaða feil, skaða ella mangul.

---

**8. Viðlíkahald av trævørum og yvirflatum**

Fyri træstaklutir, vindeygu, hurðar og fyllingar, sum eru yvirflatuviðgjørd frá framleiðslu, er tað ein treyt fyri garantiini, at vøran verður viðlíkahildin sambært vegleiðingunum frá Grant ella viðkomandi framleiðara.

Málaðar og lakeraðar fyllingar í træ skulu yvirflatuviðgerast minst **triðja hvørt ár** fyri at varðveita garantiina.

Í harðbalnum veðurøki, ella har vøran er serliga útsett fyri vindi, regni, salti, sjóroki ella sól, kann tað vera neyðugt at viðlíkahalda oftari.

Um skaði kemur á yvirflatuna, skal hann bøtast beinanvegin.

Vanligt slit, smáar litbroytingar, veðurávirkan, harpiksúttrekk, rivur í træi ella skaðar orsakaðir av manglandi viðlíkahaldi verða ikki mett sum framleiðslu- ella tilfarsfeilir.

---

**9. Viðlíkahald í harðbalnum veðurumstøðum**

Grant vørur, sum eru monteraðar í økjum við harðbalnum veðurumstøðum, krevja serligt og oftari viðlíkahald.

Hetta er serliga galdandi fyri vørur, sum eru útsettar fyri:

- nógvum vindi
- sjóroki
- salti í luftini

- nógvari vætu í luftiini
- nógvum regni
- opnum og óvardum staðsetingum

Í slíkum umstøðum skal keypari tryggja, at vøran verður regluliga reinsað, avfeska, smurd og viðlíkahildin eftir tørvi.

Beslag, hongsl, skrúvur, handtøk, ventilar, lás, cylindarar og aðrir metalpartar skulu reinsast og smyrjast regluliga. Í økjum við sjóroki, salti ella øðrum aggressivum umhvørvi kann hetta vera neyðugt fleiri ferðir um árið.

Rust, oxidlag, mislitir ella ágangur á beslag og metalpartar, sum stavar frá salti, sjóroki, vindi, vætu, manglandi avfesking, manglandi smyrjing ella manglandi viðlíkahaldi, verður ikki mett sum framleiðslu- ella tilfarsfeilur og er tí ikki fevnt av garantiini.

Um rust ella oxidlag sæst á beslagum ella metalpørtum, skal hetta reinsast og viðgerast beinanvegin, so skaðin ikki mennist.

Garantiið fevnir bert um brek í virkisføri ella styrki á beslagum, sum kunnu førast aftur til framleiðslu- ella tilfarsfeil, og ikki um vanligan ágang frá umhvørvinum ella manglandi viðlíkahald.

---

**10. Rust, oxid og fremmandar partiklar á yvirflatum**

Rust, oxidlag, mislitir ella punktir á profilum, rammum, karmum, beslagum ella øðrum yvirflatum verða ikki í sær sjálvum mett sum framleiðslu- ella tilfarsfeilur.

Slík viðurskifti kunnu millum annað standast av salti, sjóroki, vætu, byggistøvi, metal- ella stálpartiklum frá umhvørvinum, slípistøvi, arbeiði hjá øðrum handverkarum, verkførum, skurði, boring, sveising, festibúnaði ella øðrum ávirkanum eftir levering.

Um rust, oxidlag, mislitir ella punktir síggjast á yvirflatum eftir, at verjufolia, klistrimerki ella emballaga er tikin av, verður hetta vanliga mett sum ágangur ella dálking, sum er komin á vøruna eftir framleiðslu, og ikki sum framleiðslu- ella tilfarsfeilur.

Slíkur ágangur skal reinsast og viðgerast beinanvegin, so skaðin ikki mennist.

Garantiið fevnir bert um rust, oxid, mislitir ella punktir á yvirflatum, um tað kann prógvast, at orsøkin er ein framleiðslu- ella tilfarsfeilur við sjálvari vøruni.

---

**11. Málað beslag, hongsl og vindkrókar**

Garantiið fyri málað hongsl, vindkrókar, krampar og líknandi lutir fevnir bert um virkisføri og styrki.

Garantiið fevnir ikki um, at máling á hesum lutum kann flusna av, tá lutirnir verða brúktir, skava móti øðrum, verða ávirkaðir av veðri ella verða útsettir fyri vanligum sliti.

---

**12. Viðurskifti, sum ikki eru fevnd av garantiini**

Garantiið fevnir ikki um feilir ella skaðar, sum standast av:

- skeivari goymslu
- skeivum flutningi eftir móttøku
- skeivari ella ófullfíggjaðari montering
- skeivari viðferð ella nýtslu
- manglandi ella ónøktandi viðlíkahaldi
- manglandi avfesking
- manglandi reinsing
- manglandi smyrjing
- skaðum frá øðrum handverkarum
- rørslum í bygningi ella nærliggjandi konstruktionum
- setingum í bygningi
- skeivum ella óstøðugum undirlagi, ella manglandi klossing
- stoyti, slagi, broti ella øðrum uttanhýsis ávirkanum
- termiskum broti ella hitaávirkan
- frostspreinging
- kemiskari ávirkan
- vanligum sliti
- veðurávirkan, sum er vanlig fyri staðsetingina
- rusti, oxidlagi ella mislitum orsakað av sjóroki, salti, vætu ella vindi
- rusti, oxidlagi, mislitum ella punktum á profilum, rammum, karmum, beslagum ella øðrum yvirflatum, sum standast av byggistøvi, metal- ella stálpartiklum, slípistøvi, arbeiði hjá øðrum handverkarum, skurði, boring, sveising, festum ella øðrum ávirkanum eftir levering
- vantandi verja undir bygging
- feilir, lekar, skaðar, rørslur, deformeringar, glasbrot ella funktiónstrupulleikar á **opningsvindeygum, hurðum og øðrum elementum við røriligum pørtum**, tá annað mátið er størri enn **1288 mm**, og á **fastkarms-elementum**, tá annað mátið er størri enn **2500 mm**, í tann mun hetta stavar frá veðurávirkan, vindi, veðurtrýsti, regni, sjóroki, hitabroytingum, bygningsrørslum, skeivari montering, vantandi klossing, vantandi festing, vantandi avstíving ella øðrum viðurskiftum uttan fyri sjálva framleiðsluna

Garantiið fellur eisini burtur heilt ella lutvíst, um vøran eftir levering er eftirviðgjørd ella broytt, t.d. við:

- slíping
- sandblásing
- etsing
- máling
- klistring
- foliu
- áseting av lutum á glas ella karm
- aðrari yvirflatuviðgerð

---

**13. Rútar og glas**

Garantiið fevnir bert um feilir í rútaglasi, sum kunnu førast aftur til framleiðslu- ella tilfarsfeil.

Sjónlig meting av rútaglasi verður gjørd bæði frá útsíðu og innsíðu í vanligum, óbeinleiðis dagsljósi.

Metingin verður gjørd við:

- **2 metra frástøðu** fyri sjónlig brek í glasi
- **5 metra frástøðu** fyri afturkasting í glasi

Brek ella manglar, sum ikki síggjast frá hesum frástøðum, verða mett sum kosmetiskir og geva ikki rætt til garanti, uttan so at brekið ella mangulin hevur ávirkan á virkisførið hjá vøruni.

Reklamationsfreistin fyri sjónliga góðsku á rútaglasi er:

- **3 mánaðir frá nýtsludegi**
- við nýbygging: **3 mánaðir frá innflytingardegi**

Garantiið fevnir ikki um:

- rivur, merkir ella sjónlig brek, sum ikki verða fráboðað innan freistina
- brek, sum ikki síggjast við meting sambært omanfyristandandi
- brotið glas eftir levering
- termiskt brot
- frostspreinging
- skaðar frá foliu, líming, gardinum, innbúgvi ella øðrum lutum tætt við glasið
- kondens á innaru ella uttaru síðu av glasi

- skaðar, sum standast av skeivari montering, vantandi drening, skeivari klossing, rørslum í konstruktionini ella øðrum viðurskiftum eftir levering

Døgg ella kondens á glasi, sum stavar frá vætu í luftini, vantandi útlufting, bjálving, kuldabrúgvum ella øðrum bygningsviðurskiftum, verður ikki mett sum ein feilur við vøruni.

---

**14. Innbygdir og ásettir lutir í rútar**

Um rútar hava innbygdar ella ásettar lutir, t.d. sprossar, blyrútar, alarm, persiennur ella líknandi, eru hesir lutir ikki fevndir av vanligu vørugarantiini, uttan so at hetta er skrivliga avtalað.

Áklistraðar energisprossar ella líknandi á rútar broyta ikki garantitíðina.

Røriligir lutir, sum eru innbygdir í rútar, eru ikki fevndir av vanligu garantiini, uttan so at annað er skrivliga avtalað.

---

**15. Elektroniskar vørur og tilhoyr**

Fyri elektroniskar vørur og tilhoyr er garantitíðin **2 ár** frá leveringartíðspunktinum.

Hetta fevnir millum annað um:

- el-lás
- el-vindeygaopnarar
- hurðalukkarar
- hurðapumpur
- handtøk
- cylindarar
- annað leyst ella elektroniskt tilhoyr

Garantiið fevnir bert um framleiðslu- og tilfarsfeilir og ikki um slit, skeiva nýtslu, skeiva montering, skeiva tilsluting ella vantandi viðlíkahald.

---

**16. Umvæling og útskifting**

Um ein garantifeilur kann rættast á fullgóðan hátt við umvæling ella lutvísari útskifting, hevur Grant rætt til at velja hesa loysnina heldur enn at skifta alla vøruna.

Fyri umvældar vørur heldur upprunaliga garantitíðarskeiðið fram.

Fyri staklutir, sum verða skiftir út, er tó altíð ein garantitíð á **2 ár** frá tí degi, stakluturin er skiftur.

Um øll vøran verður skift út, t.e. alt vindeygað ella hurðin íroknað karm, byrjar nýtt garantitíðarskeið fyri ta nýggju vøruna.

---

**17. Fráboðan um reklamation**

Reklamation skal fráboðast skrivliga til Grant ella tann veitara/arbeiðstakara, sum hevur veitt vøruna.

Fráboðan skal gevast í seinasta lagi **3 mánaðir eftir**, at feilurin er ella átti at verið uppdagaður.

Reklamation skal innihalda:

- ordra- ella fakturanummar
- myndir av feili ella skaða
- lýsing av trupulleikanum
- upplýsingar um levering
- upplýsingar um montering
- upplýsingar um hvør hevur monterað vøruna
- møguliga merking á vøruni ella rútinum

Grant hevur rætt til at kanna vøruna, áðrenn støða verður tikin til, um talan er um ein garantifeil.

Um Grant ikki fær møguleika at kanna vøruna, áðrenn hon verður broytt, umvæld, niðurtikin ella burturbeind, kann Grant vísa reklamationini aftur.

---

**18. Montagu- og viðlíkahaldsvegleiðing**

Røtt montering og rætt viðlíkahald eru avgerandi fyri funktión, livitíð og garanti.

Grant vørur skulu monterast og viðlíkahaldast sambært galdandi montage- og viðlíkahaldsvegleiðingum frá Grant ella viðkomandi framleiðara.

Vegleiðingar kunnu fáast frá Grant ella takast niður av **grant.fo**.

Manglar ella skaðar, sum standast av skeivari montering, skeivari goymslu, skeivari handfaring ella manglandi viðlíkahaldi, eru ikki fevndir av garantiini.

---

**19. Skjalprógv fyri viðlíkahaldi**

Í sambandi við reklamation hevur Grant rætt til at krevja, at keypari skjalprógvar ella í minsta lagi sannlíkindager, at kravd goymsla, montering, reingerð, avfesking, smyrjing og annað neyðugt viðlíkahald er framt rættstundis og sambært galdandi vegleiðingum.

Hetta kann t.d. vera við:

- myndum
- frágreiðing um reingerð, avfesking og smyrjing
- kvittanum fyri viðlíkahaldsvørur
- frágreiðing frá handverkara ella servicefólki

- øðrum hóskandi skjalprógvi

Um keypari ikki kann skjalprógva ella sannlíkindagera, at væran er viðlíkahildin, goymd og handfarin eftir tørvi og sambært vegleiðingunum, kann Grant vísa reklamationini aftur heilt ella lutvíst, um hetta hevur týdning fyri metingina av orsøk, ábyrgd ella umfangi av tí fráboðaða viðurskiftinum.

---

**20. Landafrøðiligt gildisøki**

Hesar garantitreytir eru bert galdandi fyri Grant vørur, sum eru seldar og monteraðar í Føroyum, uttan so at annað er skrivliga avtalað.

---

**21. Serligt fyri Grant Primo**

Grant Primo vørur eru framleiddar av Primo Vinduer A/S, vegna Grant P/F

Garantiið, sum Grant veitir keypara fyri Grant Primo vørur, er í mesta mun grundað á tær rættindi og ta ábyrgd, sum Grant sjálvt hevur mótvegis framleiðara og/ella undirveitara, tó uttan at hetta skerjir tey rættindi, sum keypari møguliga hevur sambært ófrávíkiligari lóggávu.

Grant kann ikki áleggjast víðari ábyrgd fyri Grant Primo vørur enn tað, sum framgongur av hesum garantitreytum, uttan so at hetta er skrivliga avtalað.

---

**22. Fyrivarni**

Grant hevur rætt til at vísa reklamation aftur, um væran ikki er monterað, nýtt ella viðlíkahildin sambært galdandi vegleiðingum.

Grant hevur eisini rætt til at vísa reklamation aftur, um skaðin stavar frá viðurskiftum, sum Grant ikki hevur ábyrgd av, herundir arbeiði hjá øðrum veitarum, skeivar byggitekniskar loysnir, vantandi verja undir bygging ella óvanlig ávirkan eftir levering.

Garantiið fevnir ikki um viðurskifti, sum liggja uttan fyri tað, sum Grant sjálvt kann ábyrgjast fyri sum seljari av vøruni.

---

**23. Lógarval og verjuting**

Hesar garantitreytir skulu tulkast og nýtast sambært føroyskum rætti, uttan at fyrilit verða tikin fyri lógvalsreglum, sum kundu ført til nýtslu av aðrari lóggávu. Ósemjur, sum stinga seg upp í sambandi við hesar garantitreytir, og sum ikki verða loystar í sátt, skulu – í tann mun galdandi ófrávíkilig lóg ikki ásetir annað – leggjast fyri rættin í Føroyum sum verjuting hjá Grant.